## Eggjar Obama



Demokratiski senatorurin John Kerry, sum er formaður í uttanríkisnevndini hjá amerikanska Senatinum, vil hava Barack Obama, forseta at leggja størri dent á at fáa semju um ein veðurlagssáttmála á ST-ráðstevnuni í Keypmannahavn seinni í ár. Blaðið Washington Post veit at siga, at Kerry og Obama hildu fund í Hvítu Húsunum herfyri, og at senatorurin eggjaði forsetanum til at gera meiri fyri at fáa Senatið at samtykkja uppskotið um eina amerikanska veðurlagslóg, sum hevur ligið í Senatinum eina tíð. Eftir uppskotinum skal amerikanska $CO_2$-útlátið skerjast 20 prosent innan 2020.

## Bretland nærkast vend

Tað seinasta árið ella so hava bretar drigist við eitt tað størsta búskaparliga bakkastið síðani seinna heimsbardaga, men nú eru loksins tekin um, at gongdin fer at venda skjótt. Húsaprísurin fellur ikki longur, og tøl hjá handilsfelagnum vísa, at eftirspurningurin eftir gerandisvørum er veksandi. Bretsku búskaparfrøðingarnir høvdu væntað framgongd í triðja ársfjórðingi. Tey seinastu tølini, at framleiðslan í ídnaðinum minkaði eitt lítið vet í august. Tølini fyri september eru ikki tøk enn, men búskaparfrøðingarnir vænta, at tey fara at vísa vøkstur í framleiðsluni.



# Dómar staðfestir

**Ein matstovueigari og hjálparmaður hansara skulu inn at sita fyri at hava verið harðligir móti einum viðskiftafólki**

RÆTTARMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ein matstovueigari og hjálparmaður hansara fingu einki burtur úr at kæra dómarnar, sum teir fingu fyrr í ár í Føroya rætti. Landsrætturin staðfesti báðar dómarnar.

Tað var ein hending í eini matstovu í Havn í desember og fjør.

Beint fyri, at matstovan skuldi lata aftur út á morgunin, ætlaði ein maður sær inn, men tað noktaði matstovueigarin honum.

Meðan hjálparmaður hansar helt, slerdi eigarin tann óvælkomna gestin.

Teir noktaðu seg sekar báðir, men menninir vóru dømdir út frá frágreiðingunum hjá tveimum vitnum.

Matstovueigarin fekk 60 daga treytaleysa fongsulsrevsing, og hjálparmaður hansara fekk 30 daga treytaleysa fongsulsrevsing.

Dómarnir vóru so harðir, tí tað eru herdar umstøður, tá ið talan er um ein matstovueigara og starvsfólk hansara.

# Fekk linari revsing

**Ein 25 ára gamal maður, sum hevði verið í song við ein 14 ára gamlari gentu, fekk í eystara landsrætti dómin linkaðan eitt sindur**

RÆTTARMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er einki sum eitur. Revsivert er hava kynsligt samband við ungfólk undir revsingaraldur, tað vil siga yngri enn 15 ár.

Hetta varð enn eina ferð staðfest í einum dómi í Eystara landsrætti í Føroyum herfyri.

Ein 25 ára gamal maður umbar seg við, at 14 ára gamla gentan, sum hann hevði verið í song við, hevði verið við uppá tað.

Men tað segði tað sama.

Í Føroya rætti varð maðurin dømdur tríggjar mánað fongsulsrevsing, harav ein mánaður varð treytaleysur, og hann skuldi inn at sita tann mánaðan.

Eystari landsrættur lækkaði revsingina til, at allir tríggir mánaðirnir skuldu vera treytaðir.

Maðurin varð eisini dømdur at rinda gentuni endurgjald.

# Skal sita allan dómin

**Eystari landsrættur heri dómin móti einum manni í 40-árunum, sum hevði verið ónærisligurmóti einum smábarni**

RÆTTARMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sjálvt heilt smá børn kunnu sannføra myndugleikarnar um tað, hava tey verið fyri kynsligum ágangi.

Ein maður í 40-árunum vísti aftur, at hann hevði gjørt nakað móti einum barni, sum tá var trý ár og 10 mánaðir gamalt.

Men bæði Føroya rættur og Eystari landsrættur trúði betur barninum enn manninum.

Føroya rættur dømdi mannin tríggjar mánaða fongsulsrevsing, harav ein mánaður skuldi sitast.

Eystari rættur dømdi mannin at sita allan dómin, serliga tí gentan var so lítil.

Tá ið foreldrini fingu frænir av, hvat var hent, vendu teyr sær beinanvegin til barnaverndina, sum fóru beint til politiið.

Tann lítla gentan skal hava endurgjald frá manninum.